## Heimsins ljótasti hundur



Tvey ára gamli hundurin Elwood úr New Jersey í USA hevur fingið hann ivasama heiður at verða kosin heimsins ljótasti hundur. Elwood, sum vegna sína margháttligu útsjónd eisini verður róptur E. T. og Yodi, er ein blandingur millum ullaleysa slagið Chinese Crested og Chihuahua. Kjósanin fór fram við árligu býarstevnuna í Marin-Sonoma í Kalifornia, og eigarin er ógvuliga errin av heitinum sum heimsins ljótasti hundur.

## Madelaine á Malta

Løgreglan hevur sett umfatandi leiting í verk, eftir at fimm vitnir óheft av hvørørðum hava sagt seg hava sætt lítlu gentuna á oynni Tað vóru í gjár lidnir júst 50 dagar síðani Madelaine McCann var burturflutt úr eini frítíðaríbúð, sum foreldur hennara høvdu leigað í Algarve í Portugal. Síðani hevur verið leitað uttan íhald eftir lítlu gentuni, men higartil uttan úrslit.

# Atlantic Petroleum tryggjar vøkstur

**Føroyska oljufelagið hevur gjørt eina lánsavtalu við Bank of Scotland um 50 milliónir pund í láni. Samstundis flytir felagið úr skrásetingarbólki Small Cap til Mid Cap hjá OMX-skrásetingini**

LÁNTØKA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í fjórða ársfjórðingi í ár fer føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum væntandi undir framleiðslu av olju á sonevnda Chestnut økinum, og fyrra hálvár næsta ár verður eisini framleitt á Ettrick økinum.

Stjórin í Atlantic Petroleum, Wilhelm Petersen, sigur, at felagnum ikki nýtist at upptaka lán sum so, tí teir megna at fara undir framleiðsluna við verandi eginkapitali, men fyri at útnytta støðuna til framhaldandi menning av felagnum, hava teir nú í eina tíð havt samráðingar við ymiskar oljulánveitarar



*Wilhelm Petersen, stjóri á Atlantic Petroleum*

- Nú eru vit so komnir ásamt við ein av stóru bankunum innan oljulánsveiting, Bank of Scotland, um lánistødd, tíðarskeið og rentu, sigur Wilhelm Petersen.

Talan er um eitt lán upp á 50 milliónir dollarar, og tað er komandi framleiðslan á nevndu oljuøkjum, ið fær bankan at lata lánið.

### Flytir upp

Nærum samstundis sum hetta hendir, boðar OMX-skrásetingin frá, at Atlantic Petroleum flytir ein bólk upp í OMX-bólkaskipanini. OMX býtir íslendsk, svensk, finsk og donsk – herundir føroysk – feløg upp í tríggjar bólkar, nevndir Nordic Small Cap, Mid Cap og Large Cap. Í flytingunum millum bólkarnar, sum verður skrásett 2. juli, flytir Atlantic Petroleum úr Small Cap upp í Mid Cap.

Hesir bólkar eru avgjørdir av, hvussu nógv teir eru verdir á marknaðinum. Small Cap eru feløg og fyritøkur, sum eru skrásetti fyri undir 150 milliónir evrur, Mid Cap eru tey, ið eru verd millum 150 milliónir og eina milliard evrur og Large Cap yvir milliardina evrur.

Flestu feløg, ð flyta bólk, fara uppeftir, men nøkur fá fara hinvegin. 36 feløg flyta upp, meðan fimm flyta niðureftir.

# Heðin gjørdi einki skeivt

**Hetta er niðurstøðan hjá Christiani Andreasen, sakførara, ið varð biðin at kannna málið um Gamla Realskúlan nærri**

KANNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað stóðst nakað av roki av, at eitt felag nevnt Vísink Smíð hevði fingið arbeiðið at umvæla Gamla Realskúlan. Málið hevði tvinnar síður. Onnur var, at felagið hevði fingið arbeiðið, uttan at tað hevði verið bjóðað út alment, og hitt var, at annar av eigarunum av Víking Smíð er sonur tekniska stjóran í Havn.

Málið varð umrøtt á fyrsta sinni í sjónvarpinum og síðani fylgt upp dagin eftir við samrøðu við borgarstjóran, sum bedýraði, at einki sum helst skýmaskotskent var farið fram. Og fyri at prógva hesum, skuldi hann biða óvildugar og av kommununi óheftan sakførara hyggja nærri at málinum. Og tað er so nú hent.

Christian Andreasen hevur hugt gjøgnum alt málið og hevur latið eina frágreiðing frá sær hesum viðvíkjandi. Frágreiðingin fyllir 13 A-4 síður við viðgerð málið frá byrjanini í mars, tá ein næmingur fekk skaða í skúlanum, fram til dagin í dag. Frágreiðingin varð løgd fram á býráðsfundinum hjá kommununi hóskvøldið.

Sakførarin hevur býtt málið upp í fýra løgfrøðisligar spurningar: 1: Avgerðin um at steingja skúlan og umvæla hann, 2: Avgerðin um at Gamli Realskúlin skal nýtast til annað endamál, 3: Hevur ein kommuna skyldu til at bjóða arbeiði út og 4: Høvdu borgarstjórin og tekniski stjóri gegnistrupulleikar.

### Umvæling ella...

Var talan yvirhøvur um umvæling, ella skuldi málið roknast sum nakað meiri, var so fyrri partur av spurninginum hjá Christiani Andreasen. Og har er niðurstøðan púra greið: Talan var um umvæling. Og til tað hevði borgarstjórin neyðugu heimildina.

Næsta punktið var júst líka greitt. »Eg meti ikki, at borgarstjórin hevur tikið ósaklig fyrilit, tá hann tók avgerð sína um broytta nýtslu av bygninginum«, sigur Christian Andreasen í niðurstøðu síni.

Í triðja spurninginum metir sakførarin, at einki er farið skeivt fram løgfrøðisliga, sjálvt um hann ikki tekur beinleiðis støðu til, hvørt tað hevði verið rættari at latið fleiiri enn ein bjóða upp á arbeiðið.

Síðsti spurningurin er fyri so vítt eins greiður sum hinir fyrru. Sakførarin metir ikki, at brot er framt á reglurnar í fyrisitingarlógini um gegni. Hann leggur tó aftrat:

»Tó skal viðmerkjast, at málsumsitingin ikki hevur verið nøktandi við at at eg meti, at tekniska umsitingin átti at havt gjørt eitt skrivligt notat um gegnistrupulleikan hjá tekniska stjóranum, og eina skrivliga innstilling við eini málslýsing og innstilling til konkreta avgerð«.

Men samanum tikið hevur Heðin Mortensen einki skeivt gjørt í sambandi við málið um Gamla Realskúla, sambært Christiani Andreasen.



*Christian Andreasen, sakførari, fríkennir fult og heilt borgarstjóran fyri at hava gjørt nakað skeivt í málinum um Gamla Realskúla*